TIL **ARBEIÐIS**




*– Eg havi lært nógv um demens, síðan eg kom á Stjørnulon at arbeiða, og eg havi samstundis lært rættiliga nógv um meg sjálva, sigur 25 ára gamla Jóhanna Henriksen*

FAKTA **JÓHANNA HENRIKSEN**

**Starv:** Heilsurøktari
**Besta við starvinum:** At læra at vera tolin og lurta
**Ringasta við starvinum:** Trívist við tí eg geri
**Størsti dreymur við starvi:** At læra meiri um minnisveik
**Størsta frambrot:** Tilboðið um kvøldtilhald
**Starvstíð:** Síðan á sumri 2009
**Lívsstarv:** ... aldrig sige aldrig :)
**Starvsfólk:** 6-8
**Staður:** Stjørnulon, Jøkulsstræti, Tórshavn
**Leiðari:** Ester Husgaard

**MYND:** VILMUND JACOBSEN

# UNG ANSAR **MINNISVEIKUM**

HÓAST HON **BERT** ER 25 ÁRA GOMUL, HELDUR TAÐ HENNI IKKI AFTUR Í AT BRÚKA SÍN ARBEIÐSDAG UPP Á AT SKAPA **MINNISVEIKUM** EINA TILVERU



**TIL ARBEIÐIS**
**Vilmund Jacobsen**
vilmund@sosialurin.fo

Hon er fødd 22. juli 1984. Hugnaliga bygdin Sandur var karmur um hennara barnaár og fyrstu ungdómsár. Her sleit hon sínar barnaskógvar, og her gekk hon í skúla, til hon í 2001 fór úr 10. flokki á Sandoyar Meginskúla og á studentaskúla í Hoydølum.

Unga og snøgga kvinnan, vit umrøða, er Jóhanna Henriksen, sum í dag arbeiðir við minnisveikum á dagtilhaldinum Stjørnulon í Jøkulsstræti í Havn.

## Búðu saman

– Eg og ein vinkona fluttu saman úr Sandoynni til Havnar. Foreldur hennara eiga hús í Havn, og vit fingu tey lagaliga til leigu. Vit gleddu okkum at sleppa til Havnar, og eg haldi, at hetta riggaði ordiliga væl. Vit komu í góðan flokk í Hoydølum, har samanhaldið var gott, sigur hon.

Eftir at Jóhanna hevði tikið studentsprógv í 2004, var hon við Nærabergi í umleið eitt hálvt ár. Tá hon fór í land av verksmiðjutrolaranum, byrjaði hon at arbeiða í heimarøktini í Havn. Her arbeiddi hon frá á vári í 2005 til januar í 2007, tá hon fór niður til Danmarkar á sjúkrasystraskúla.

Men Jóhanna heldur ikki, at sjúkrasystraskúlin um hetta mundið var akkurát hon.

– Vit vóru seks næmingar í mínum flokki, sum góvust eftir umleið hálvum ári. Sjálv haldi eg, at undirvísingin tóktist mær ógvuliga teoretiskt, og eg saknaði í størri mun at kunna brúka onkrar av teimum royndum, eg hevði gjørt mær í heimarøktini.

Hon sigur, at tá hon gavst á sjúkrasystraskúlanum, tímdi hon ikki upp til Føroyar aftur beinanvegin, men fór at hyggja seg um eftir einari útbúgving, sum var meiri praktiskt orienterað.

– Eg gjørdi av at fara á heilsurøktaraskúla og gjørdist liðug sum heilsurøktari í 2009.

Jóhanna sigur, at henni dámar best at hava tingini í hondini og arbeiða við teimum haðani, sum hon tekur til.

– Á heilsurøktaraskúlanum høvdu vit nakrar bøkur, vit skuldu lesa. Vit høvdu soleiðis eitt ítøkiligt pensum, og útbúgvingin tók eisini í størri mun hædd fyri teimum praktisku viðurskiftunum í starvinum, leggur hon aftrat.

## Lærdi nógv

Jóhanna Henriksen heldur, at valið at gevast á sjúkrasystraskúlanum og fara á heilsurøktaraskúla, er eitt tað besta valið, hon hevur gjørt.

– Eg lærdi ógvuliga nógv á skúlanum. Hetta var ein góður skúli við góðum lærarum. Vit vóru 20 kvinnur og ein maður í flokkinum – úr ymiskum heraðshornum í Danmark, eins og onkur innflytari eisini var í okkara flokki. Hetta var ein góður flokkur, tó at vit vóru so ymisk.

Jóhanna varð liðug sum heilsurøktari í Danmark fyrst í apríl mánaði í 2009.

– Longu hin 20. apríl var eg heima í Føroyum aftur. Eg hevði søkt um avloysarastarv ymsastaðni í heimarøktini og tók av arbeiðstilboði á Stjørnulon í Havn, sum er dagtilhald fyri minnisveik. Tá eg byrjaði, var heimið bara opið um dagin, men síðan 1. september í fjør hava fólk verið á heiminum bæði um dagin og um kvøldarnar. Heimið er soleiðis opið fyri minnisveikum frá klokkan 9 á morgni til klokkan 21 á kvøldi. Skiftið fer fram um 15-tíðina, og átta fólk eru á heiminum ávikavist í dagtímunum og í kvøldtímunum.

Síðan Jóhanna kom heimaftur til Føroya sum útbúgvin heilsurøktari, hevur hon okkurt skifti eisini loyst av á Láargarði og á sambýlinum fyri menningartarnað og sálarliga veik við Fugloyarveg.

## Gevur innihald

– Flestu fólkini, sum vit hava í Stjørnulon, eru á stovninum hvønn dag, men onkur er einar tríggjar dagar um vikuna. Yngsti borgarin er stívliga sjeyti ár – og hin elsti er farin um tey níti.

Jóhanna sigur, at hennara starv á Stjørnulon helst er knýtt at, hvørt royndin við kvøldtilhaldinum fer at halda fram.

– Upprunaliga skuldi henda ætlan koyra í fýra mánaðir, men hon koyrir enn, og eg vóni, at hon heldur fram.

Ungi heilsurøktarin vísir á, at her er talan um tilsamans 16 minnisveik fólk, sum hava eina tilveru ein stóran part av samdøgninum í Stjørnulon.

– Um hesi fólk ikki sleppa á stovnin, sita fleiri teirra helst einsamøll og keða seg heima við hús. Fólk eru fegin um tilhaldið. Vit matgera sjálvi, og eru tey gomlu og minnisveiku so fræg, at tey kunnu luttaka, kunnu tey vera við í matgerð, baking ella stytta sær stundir við at sita og binda.

Tá Jóhanna tók sína útbúgving í Danmark, skrivaði hon høvuðsuppgávu um alzheimers.

– Eg vildi gjarna læra meiri um alzheimers og demens, og tí valdi eg hetta evnið í høvuðsuppgávuni. Tá tú arbeiðir við gomlum, skerst ikki burtur, at tú samstundis kemur at arbeiða nógv við minniveikum.

## Tolsemi avgerandi

Jóhanna Henriksen sigur, at hon hevur lært rættiliga nógv hesa lutfalsliga stuttu tíð, hon hevur arbeitt í Stjørnulon.

– Eg havi lært nógv um demens, og eg havi samstundis lært rættiliga nógv um meg sjálva. Í fyrsta lagi havi eg lært at vera meiri tolin, og eg havi lært nógv um, hvussu eg ikki skal gera. Tá tú arbeiðir við minnisveikum, skalt tú hugsa teg væl um, áðrenn tú sigur nakað, og tú noyðist at geva tær góðar stundir.

Vit spurdu at enda Jóhonnu Henriksen, um hon hevur ætlanir um at útbúgva seg meiri, nú hon enn bert er 25 ára gomul.

– Eg havi sjálvsagt hugsað um ymiskt, eitt nú eina útbúgving sum fysioterapeutur ella ergoterapeutur – og eg havi eisini hugsað um sjúkrasystraskúlan aftur. Men fyribils eri eg skúlatroytt og trívist væl við tí, eg geri, sigur Jóhanna Henriksen.